# Vinnupolitisku telvingarnar halda á

**Samráðingarleiðarin, Jóannes Eidesgaard, letur væl at samráðingarstevninum. Vinnupolitikkur er framvegis á skránni. Hóast flokkarnir eru hugsjónarliga ymiskir á máli um, hvussu vinnupolitikkurin skal orðast, so gongur væl at finna eina felags semju á økinum**

SAMGONGU-SAMRÁÐINGAR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Teir líða onga neyð, menninir sum samráðast um nýggja samgongu á Gamla Apoteki*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Seinast í sjeytiárunum hevði amerikanski tónleikabólkurin, The Jackson Five, við umstrídda Michael Jackson á odda eitt stórt hitt við lagnum ABC.

A-B-C tónarnir í føroyskum politikki, Fólkaflokkurin, Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin syngja framvegis sama lag og løgini gerast betri og betri fyri hvønn dag sum gongur.

Tónarnir, sum eru innspældir um vikuskiftið, ljóða, sambært samráðingarleiðaranum, Jóannesi Eidesgaard, so mikið væl, at nógv bendir á, at Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin verða flokkarnir, sum skulu mynda samgonguna komandi árini

## Tung økið

Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin hava um vikuskiftið umrøtt ríkisrættarligu støðuna og vinnupolitikk. Samráðingarleiðarin sigur, at tað er til ætlað, at tey sonevndu tungu evnini verða viðgjørd fyrst.

Viðvíkjandi vinnupolitikkinum og ríkisrættarliga spurninginum eru flokkarnir hugsjónaliga ymiskir á máli, men kortini ganga samráðingar væl.

Jóannes Eidesgaard sigur, at flokkarnir hava funnið ein felagsnevnara á ríkisrættarliga økinum og í løtuni verður dúgliga kjakast um vinnupolitikkin.

Formaður Javnaðarflokksins vil kortini einki ítøkiligt siga um, hvør felagsnevnarin er á ríkisrættarliga økinum, ei heldur hvørjar semjur higartil eru gjørdir á vinnupolitiska økinum millum flokkarnar.

## Praktiskur politikkur

Sunnudagin vórðu einskiljingar og rækjuvinnan umrøddar. Sambandsflokkurin og Fólkaflokkarnir eru hugsjónarliga samdir á vinnupolitiska økinum. Báðir flokkar siga seg vilja virka fyri einum føroyskum vinnulívið, sum byggir í størst møguligan mun á privata grundarlagið.

Javnaðarflokkurin er hinvegin afturhaldin, tá einskiljingar av almennum ognum eru á skránni. Hugsjónarligu munirnar á Fólka- og Sambandsflokkinum einumegin og Javnaðarflokkurin hinumegin, hava kortini ikki higartil elvt til stórvegis ósemjur millum flokkarnar.

– Vit vita, at flokkarnir eru ymiskir á máli, tá vit tosa um vinnupolitikk. Hetta gevur pørtunum høvið til geva seg eyka fyri at finna eina felags semju, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann greiðir frá, at eitt eru hugsjónarligir munir, eitt annað er praktiskur politikkur.

– Tað vísir seg ofta, at tað er lættari at finna semjur við flokkar sum eru ymiskir hugsjónarliga, enn flokkar sum líkjast nógv. Líkjast flokkar ov nógv, vísir tað seg ofta, at ein vil halda upp á sítt, heldur enn at finna eina felags praktiska semju, vísir formaður Javnaðarfloksins á.

Jóannes Eidesgaard vísir til samgonguna millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin frá 1990, har flokkarnir, hóast ymiskir hugsjónarliga, hildu seg til praktiskan politikk og fingu nógv av skafti.

## Alivinnan á skránni

Samgongusamráðingar skulu halda fram seinnapartin mánadagin. Kreppurakta alivinnan verða á skránni. Øll umboðini fyri Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin skuldu verða við til framløguna hjá Havbúnaðarfelagnum um alivinnuna.

Eftir framløguna fyrrapartin mánadagin, skuldi partarnir hittast seinnapartin mánadagin at umrøða alivinnuna.

# Kári farin av postinum

**Sunnudagin gjørdi Sjálvstýrisflokkurin av ikki at halda fram at skipa samgongu saman við Javnaðarflokkinum, Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum**

SAMGONGU-SAMRÁÐINGAR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Realitetssamráðingarnar byrjaðu leygardagin. Her sita umboð fyri allar fýra flokkarnar við samráðingarborðið í Fíggjarnevndarhølinum leygardagin*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

– Tá tað var greitt, at teir tríggir stóru flokkarnar ikki vildu tryggja okkum ein landsstýrissess, so gjørdi landsnevndin í Sjálvstýrisflokkinum av, at vit ikki halda fram við samráðingunum um skipan av nýggjari samgongu.

Hetta segði Kári P. Højgaard við útvarpið sunnudagin, eftir at hann og Sjálvstýrisflokkurin vóru farnir av postinum á Gamla Apoteki, har nú teir tríggir, Javnaðarflokkurin, Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin royna at skipa nýggja samgongu.

Tað vóru Sambandsflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, sum umframt Javnaðarflokkin peikaðu á Jóannes Eidesgaard sum samráðingarleiðara. Tískil valdi Jóannes Eidesgaard fyrst at bjóða hesum flokkum til samráðingar, síðani at hoyra, hvat hinir flokkarnir høvdu at siga til møguligt samstarv, áðrenn hann tók avgerð um at bjóða Fólkaflokkinum til realitetssamráðingar.

Fundur var hildin til út á kvøldið leygarkvøldið, og tá lá í luftini, at Sjálvstýrisflokkurin fór at taka seg burturúr, um teir ikki fingu vissu fyri, at flokkurin fekk ein landsstýrissess. Men líka so greitt lá tað í luftini, at tað fekk Sjálvstýrisflokkurin ikki. Eingin illstøða tóktist vera av hesum, men fyri Sjálvstýrisflokkin hevur tað týdning at vera við í arbeiðinum sum fer fram í landsstýrinum.

– Kunnu vit ikki verða við í tí arbeiði, sum fer fram har, so verður tað vónleyst hjá einum einsamallum tingmanni at arbeiða konstruktivt, segði Kári P. Højgaard, sum eftir øllum at døma verður einsamallur um at umboða Sjálvstýrisflokkin í føroyskum politikki í komandi valskeiði.

Hóast Sjálvstýrisflokkurin er farin burtur úr samráðingunum á Gamla Apoteki, so segði Kári P. Højgaard við útvarpið sunnukvøldið, at hann helt tað vera røttu avgerðina, at hann peikaði á Jóannes Eidesgaard, sum samráðingarleiðara.

– Vit mugu vera realistiskt. Tað hevði ikki nytta at peika á Anfinn Kallsberg, soleiðis sum støðan varð vorðin. Jóannes Eidesgaard er tann, sambært veljarakanningum, sum er næst best umtóktur sum løgmaður eftir Anfinn Kallsberg, tí var tað so nátúrligt at peika á hann. Hann hevur eisini prógvað í hesum samráðingunum, at hann er førur fyri at leiða slíkar samráðingar, sum hava gingið sera væl og hava verið sera konstruktivar, segði Kári P. Højgaard, sum nú kennir seg leysan av hesi møguligu samgongu. Hann fer í løgtinginum at taka støðu til mál fyri mál, fer at arbeiða konstruktivt og taka undir við teimum góðu málunum frá samgonguni.

Teir tríggir flokkarnir, sum nú samráðast, hava tilsamans 21 tingsessir aftan fyri seg. Sjey fólk eru í tingnevndunum. Nevndarbýtið verður tí fimm limir til samgonguna og tveir til andstøðuna.



*Sunnudagin beyð Fólkaflokkurin til turran bógv í Fólkafloksshølinum á Gamla Apoteki. Andrias Petersen sker av Tindhólma-bógnum, sum Jørgin Niclasen hevði við hendan dagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Sum vera man hevði Edmund Joensen rækjur við norðan av Oyri…*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*The Grand Old Man, Sverre Midjord og Johan Dahl heilsast í Javnaðarhølinum á Gamla Apoteki leygardagin, tá farið varð undir realitetssamráðingarnar leygardagin*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Nýggja stjørnuskotið hjá Javnaðarflokkinum, John Johannessen og Bjarni Djurhuus, fyrstvaldi tingmaður Fólkafloksins í Suðurstreymoy*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Heðin Zachariassen - sum fríggjakvøldið alment aftur gjørdist tingmaður Fólkafloksins, og Kaj Leo Johannesen úr Sambandsflokkinum*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Frá samráðingunum – Kári fór av postinum, søgdu hinir skemtandi, tá Kári P. Højgaard og Sjálvstýrisflokkurin tóku seg úr samráðingunum*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*